# Pátrúgvin næst

**Fríggjadagur verður av mongum mettir at vera óeydnisdagur. Kanska mest í spølni nú á døgum, men tað eru enn summi, ið hava eitt sindur av pátrúgv. Sambært Eyðuni Andreassen, fólkalívsfrøðingi, var tað gamalt, at fríggjadagur var eydnisdagur í Føroyum. Seinni er útlendska mentanin við, at tað er óeydnisdagur komin til Føroyar, og enn í dag eru summi, sum taka dagin í størsta álvara. Tveir dagar hava fingið skuldina fyri hesa pátrúgv. Annað er langi fríggjadagur, uttan at vera nakað religiøst og hin hendingin var fríggjadagin 13. oktobur í 1307, tá Filip IV. av Fraklandi gjørdi seg inn á tempulriddararnar. Hinvegin fer hátíðarhaldið at halda fram, tí talan er um góðar søgur**



## Høvdavirkið byrjaði leygardag

Hóast Høvdavirkið í Leirvík er ein nútímans fyritøka, so vilja teir ikki útfordra skepnuna, sum teir sjálvir nevna tað.

Hetta hevði til dømis við sær, at virkið byrjaði sítt virksemi ein leygardag.

- Pápi er gamal sjómaður og vildi ikki síggja fríggjadag. Hjá íslendingum er mánadagur óeydnisdagur, so vit avgjørdu at byrja mánadag, sigur Eirikur á Húsamørk, stjóri. Hann greiðir víðari frá, at virkið ongantíð byrjar nakað nýtt fríggja- ella mánadag, tí higartil hava teir verið hepnir, og vilja tí ikki niðra pátrúnna, sigur Eirikur á Húsamørk, stjóri.




## Skipafelagið legði frá landi fríggjadag

Ein mýta gongur runt í Føroyum, sum sigur, at skipini hjá Skipafelagnum ikki løgdu frá landi fríggjadagar.

- Hetta er ein gomul søga, sum leingi hevur gingið runt, at skipini skundaðu sær at lasta skipini hósdagar, soleiðis, at teir megnaðu at sleppa avstað fyri midnátt hósdag, ella bíðaðu teir til tað var farið av midnátt leygarnátt. Men eg haldi ikki tað passar, sigur Eyðun Andreassen, fólkalívsfrøðingur. Tí hann hevur eina fatan av, at skipararnir hava sagt, at teir fóru avstað fríggjadag, tí skipini byrjaðu ikki nýggjan túr. Men at alt var sami túrur, tí kundu teir eisini loysa fríggjadag.



## Tómur flúgvari

Hóast Eyðun Andreassen ikki trýr uppá nakað serligt í samband við fríggjadag 13. So hevur hann upplivað nakað heilt serligt í samband við dagin. Hann og konan skuldu flúgva til Føroyar tann 13. januar, sum var fríggjadagur tað árið.

- Tey høvdu fingið tað til, at tað var fríggjadagur 13. í 13. mánaði, so flogvøllurin var næstan tómur. Vit vóru í veruleikanum tey einastu, sum flugu til Føroyar hendan dagin, fortelur Eyðun Andreassen, sum á ongan hátt trýr hesi pátrúgv.

*"Um tú er bangin fyri fríggjadegi 13. so kallast sjúkan paraskevidekatria-phobia*